Broytt býarmynd:

# Træið stendur enn í Steinagøtu

**Her eru tvær myndir tiknar við Steinagøtu við 50 ára aldursmuni. Ovara myndin er tikin í 1955, meðan niðara myndin er tikin í februar 2005.**

Í hesi 50 árini er matvøruhandilin hjá Karl F. Johansen, skóhandilin hjá Nic. Joensen (Demmus), og garðurin og trøini millum Steinagøtu og N. Finsensgøtu tikin burtur. Í staðin fyri er økið, har handlarnir stóðu, gjørt til parkeringspláss, og har sum garðurin við trøunum var, er nú ein kiosk, og bygningurin hjá Føroya Banka er bygdur á húsagrundina.

Men tað einsama træið, sum varð plantað í 1912, tað stendur har enn.

Húsini har Simme Musikkhús helt til í mong ár (í dag Marconi), og húsini har Telebúðin er í dag, eru so gott sum óbroytt, meðan handilin Fa. Hans Joensen er burtur, og í dag stendur Handilshjarnin har.

Bilurin á myndini er ein Standard Vanguard hjá Torstein Dal-Christiansen.

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í sambandi við hesar myndirnar, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon: 314647 / 273168.

*Ovara myndin: Føroya Fornminnissavn*
*Niðara myndin: Jens Kristian Vang*





**Næstu ferð verður um, nær trøini við gamla Bókhandil á Vaglinum vórðu plantað**



## Loppumarknaður bilvask og køkutombola

TÍÐINDASKRIV

Í sambandi við námsferð hjá 03Y verður loppumarknaður, bilvask, køkutombola og okkurt gott til børnini verður á Studentaskúlanum í Hoydølum leygardagin 5. mars 2005 frá kl. 10-15.

Um onkur hevur okkurt at lata til loppumarknaðin, eru tey vælkomin at koma við í skúlan við lutunum fríggjadagin millum kl. 17-19.

Øll eru vælkomin!

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

KT-STARV Á HAGSTOVUNI

VIT SÓKNAST EFTIR EINUM VÆL ÚTBÚNUM STARVSFÓLKI TIL KT DEILDINA.

Á Hagstovuni verða flestu hagtalsuppgávur loystar í samstarvi millum hagfrøðingar og KT starvsfólk, og tað er til slíkar verkætlanir, at vit sóknast eftir eftir einum fólki.

KT skipanirnar á Hagstovuni eru grundaðar í einum Oracle umhvørvi við bæði UNIX og WINDOWS teldum. Í arbeiðinum á KT deildini verða brúkt Oracle menningar- og forritannaramboð, sum SQL, PL/SQL, Warehouse Builder etc. Somuleiðis brúka vit Oracle IAS/PORTAL í samband við heimasíðuna hjá stovninum.

Kunnleiki til eitt ella fleiri av hesum amboðum er ein fyrimunur, men ikki ein treyt. Fyrst og fremst sóknast vit eftir einum dugnaligum fólki, við innliti í datamodell, databasuskipanir og programmering.

Trý fólk eru í KT-deildini, og eru tey uppi í øllum verkætlanum á stovninum. KT arbeiðið á stovninum er eyðkent av, at nýggjar skipanir alsamt verða mentar, samstundis sum verandi skipanir verða víðari mentar. Sostatt er arbeiðið ógvuliga fjølbroytt og møguleiki er at royna seg á nógvum KT økjum.

Starvið verður lønt í samsvari við førleikar og starvsinnihald, sambært sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 1. apríl 2005.

Set teg í samband við Berg Dam ella Hermann Oskarsson á Hagstovu Føroya, telefon 35 28 00 vilt tú hava meira at vita um starvið.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA

TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR

TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO